# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um lívmóðurhálskrabba

## Sjúkueyðkenni, ið vekja illgruna um lívmóðurhálskrabba

Sjúkueyðkenni, ið skulu viðføra at spurt verður um bløðingsanamnesa og at GU verður gjørt

- Óvanligar bløðingar úr vagina, íroknað
  *bløðing eftir, at kvinna er komin í skiftisárini
  *bløðing eftir samlegu
  *onnur plettbløðing
- Blóðugt illaluktandi útflot
- Sjónligar broytingar á lívmóðurhálsi (portio)

Um eingin onnur greið orsøk er til nevndu sjúkueyðkenni, skal sjúklingurin ávísast til krabbameinsútgreining

Eisini eigur at verða ávíst til krabbaútgreining um cytologi (smear) bendir á krabbamein ella gevur illgruna um krabbamein

## Handfaring av residiv

- Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Ávísast til gynekologiska ambulatorium
- Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Nýggj ávísing gerast til krabbameinsútgreining

## Kanningar, ið ávísandi lækni helst skal gera ella spyrjast skal um

Smearkanning fyri at fáa skjótari svar
Royking
Dato fyri seinasta smear

HPV vaksinatión

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um lívmóðurhálskrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026